Eysturkommuna

# NEVNDARFUNDUR

## Býráðið

**Dagfesting:** 26.02.2026 kl. 17:00
**Málnr.:**

Nevndarlimir: Per Martin Gregersen
Magnus Skoralíð
Hanna Jensen
Ann Fuglø
Heri Mikálsson
Pól í Skorini
Unn Jarnskor Ellingsgaard
Tórur Didrik Djurhuus
Uni Rasmussen

Nevndarskrivari: Erik Lervig


| **Málsyvirlit** | | | **Síða** |
|---|---|---|---|
| **Til viðgerð:** | | | |
| 5/26 | 26/00025-2 | Umsókn til ummælis - Samanlegging av matr. nr. 330 og 306 í Leirvík | 2 |
| 6/26 | 26/00077-6 | Marknaumskipan - matr. 75c,75d,75e, 188a og 25d í Norðragøtu | 3 |
| 7/26 | 26/00078-1 | Skúlin í Leirvík - matr. nr. 422a - Tangahús og spælipláss | 4 |
| 8/26 | 26/00086-1 | Grundøkir við Lugarið, Leirvík – matr. nr. 169a - útbjóðing | 6 |
| 9/26 | 26/00106-1 | 26/00106 - Val av valnenvdum | 7 |
| 11/26 | 26/00023-3 | Umsókn um grundøki og byggiloyvi - Íbúðarbygging á havnalagnum - matr. nr. 169a í Leirvík | 10 |
| **Til viðgerð fyri afturlatnum hurðum:** | | | |
| 10/26 | 26/00079-1 | Útbjóðing av Niklasmørk - matr. nr. 215a í Syðrugøtu | 10 |

**Til viðgerð:**

## 5/26 Umsókn til ummælis - Samanlegging av matr. nr. 330 og 306 í Leirvík

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Byggi - og býarskipanarnevnd | 18.02.2026 | 5/26 | 26/00025-2 |
| 2 Býráðið | 26.02.2026 | 5/26 | 26/00025-2 |

| **Málslýsing:** |
|---|
| Eysturkommuna hevur móttikið teldupost dagfest 12. januar 2026 frá Umhvørvisstovuni, har heitt verður á kommununa, at ummæla samanlegging av matr. nr. 330 og 306 í Leirvík.<br><br>Sí skjøl í málinum.<br>• Umsókn til ummælis okkara mál nr. 25_31719 |

| **Fíggjarligar avleiðingar:** |
|---|
| Ongar |

| **Tilmæli** |
|---|
| Umsitingin mælir til, at samtykki ummæli frá Umhvørvusstovuni. |

**Byggi - og býarskipanarnevnd 18. februar 2026**
Byggi- og býarskipanarnevndin tekur undir við tilmælinum hjá umsitingini.

**Býráðið 26. februar 2026**
Einmælt samtykt at taka undir við tilmælinum hjá byggi- og býarskipanarnevndini

## 6/26 Marknaumskipan - matr. 75c,75d,75e, 188a og 25d í Norðragøtu

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Byggi - og býarskipanarnevnd | 18.02.2026 | 7/26 | 26/00077-6 |
| 2 Býráðið | 26.02.2026 | 6/26 | 26/00077-6 |

**Málslýsing:**

Eysturkommuna hevur móttikið umsókn, dagfest 9. februar 2026, um marknaðarumskipan á Oyruni í Norðragøtu. Umsóknin fevnir um matrikulering av lendi undir handilsbygninginum á Oyruni, soleiðis at bygningurin fær egið matrikkulnummar og verður matrikuleraður sum 100 % ábygt øki.

Á økinum eru í løtuni tríggir smærri matriklar, nr. 75c, 75d og 75e, ið upprunaliga vórðu ætlaðir til neyst. Ætlanin er at endurnýta hesar matriklar í sambandi við marknaðarumskipanina.

Umsitingin mælir til, at tá farið verður undir marknaðarumskipan á økinum, verður eisini býráðshúsið matrikulerað samstundis og fær egið matrikkulnummar.

Fyriskipaða broytingin er hendan:

- Matr. nr. 75c verður fluttur til handilsbygningin.
- Matr. nr. 75d verður fluttur til býráðshúsið.
- Matr. nr. 75e verður strikaður.

Víst verður til skjøl í málinum.

**Fíggjarligar avleiðingar:**

**Tilmæli**

Umsitingin mælir til, at taka undir við marknaðarumskipanini.

**Byggi - og býarskipanarnevnd 18. februar 2026**

Byggi- og býarskipanarnevndin tekur undir við tilmælinum hjá umsitingini.

**Býráðið 26. februar 2026**

Einmælt samtykt at taka undir við tilmælinum hjá byggi- og býarskipanarnevndini.

## 7/26 Skúlin í Leirvík - matr. nr. 422a - Tangahús og spælipláss

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Byggi - og býarskipanarnevnd | 18.02.2026 | 8/26 | 26/00078-1 |
| 2 Fíggjarnevnd | 23.02.2026 | 2/26 | 26/00078-1 |
| 3 Býráðið | 26.02.2026 | 7/26 | 26/00078-1 |

**Málslýsing:**

Viðv. Tangahúsinum og spæliplássinum í skúlanum í Leirvík, hevur

Tangahúsið:
Tangahúsið varð bygt í sambandi við, at hitaskipanin í skúlanum í Leirvík varð gjørd. Bygningurin varð tó ongantíð gjørdur liðugur, tí hvørki bjálving, klædningur ella tekja vórðu gjørd liðug.

Hetta hevur havt við sær, at bygningurin lekur og hevur sera vánaligt inniumhvørvi. Støðan krevur ábøtur, og mett verður, at neyðugt er at gera bygningin lidnan fyri at tryggja bygningin og inniumhvørvið.

Spælipláss:
Í sambandi við útbyggingina av skúlanum í Leirvík er verandi spælipláss tikið burtur. Nýtt spælipláss er ikki partur av verandi verkætlan, og tí hava næmingarnir í løtuni ikki atgongd til hóskandi spælipláss.

Mett verður, at tað er alneyðugt at fáa skipað eitt nýtt spælipláss, soleiðis at skúlin aftur kann veita næmingunum nøktandi umstøður til spæli og rørslu.

Umsitingin hevur kannað kostnaðin av:
- at gera spælipláss
- at klæða og fullfíggja tangahúsið

Í kostnaðinum fyri spæliplássinum eru fylgjandi leikur íroknað:
- Spælitorn
- Klatriborg
- Reiggja við tveimum setrum
- Reiðurreiggja
- Trampolin
- Hangimotta

Harumframt eru fallundirlag, lendisarbeiði og uppseting íroknað í samlaða kostnaðinum.

- 

| **Fíggjarligar avleiðingar:** |
| --- |
| |

| **Tilmæli** |
| --- |
| Umsitingin mælir til, at játta pengar til tangahúsið og spæliplássi í skúlanum í Leirvík. |

**Byggi - og býarskipanarnevnd 18. februar 2026**
Byggi- og býarskipanarnevndin tekur undir við tilmælinum hjá umsitingini.

**Fíggjarnevnd 23. februar 2026**
Fíggjarnevndin mælir til at taka undir við tilmælinum hjá byggi- og býaskipanarnevndni. Áðrenn endalig støða verður tikin til ætlanina fyri spæliplássi, skal tað viðgerast av mentanarnevndini og leiðsluni í skúlanum.

**Býráðið 26. februar 2026**
Einmælt samtykt at taka av partinum av tilboðnum sum er til tangahúsið, og játta pening til tað. Málið viðv. spæliplássinum verður beint aftur í avvarandi nevndir til víðari viðgerð.

## 8/26 Grundøkir við Lugarið, Leirvík – matr. nr. 169a - útbjóðing

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Vinnunevndin | 17.02.2026 | 2/26 | 26/00086-1 |
| 2 Byggi - og býarskipanarnevnd | 18.02.2026 | 10/26 | 26/00086-1 |
| 3 Fíggjarnevnd | 23.02.2026 | 4/26 | 26/00086-1 |
| 4 Býráðið | 26.02.2026 | 8/26 | 26/00086-1 |

| **Málslýsing:** |
|---|
| Eysturkommuna hevur arbeitt við einari ætlan um at útstykkja grundøkir til frítíðarhús á matr. nr. 169a við Lugarið í Leirvík.<br><br>Umsitingin hevur síðani fyrireikað og gjørt útbjóðingartilfar til grundøkini, sí viðfest skjøl.<br><br>Ætlanin er, at áhugað kunnu søkja um grundøki, og at lutakast síðani verður framt millum umsøkjararnar. Hvør umsøkjari kann bert fáa tillutað eitt grundøki, og hjún verða roknað sum ein umsøkjari.<br><br>Skjøl í málinum: |

| **Fíggjarligar avleiðingar:** |
|---|
| |

| **Tilmæli** |
|---|
| Umsitingin mælir til, at taka undir við hesum og bjóða grundøkini út. |

**Byggi - og býarskipanarnevnd 18. februar 2026**
Byggi- og býarskipanarnevndin tekur undir við tilmælinum hjá umsitingini.

**Vinnunevndin 18. februar 2026**
Vinnunevndin tekur undir við tilmælinum hjá umsitingini.

**Fíggjarnevnd 23. februar 2026**
Fíggjarnevndin mælir til at taka undir við tilmælinum hjá umsitingini.

**<u>Býráðið 26. februar 2026</u>**
Einmælt samtykt at taka undir við tilmælinum hjá umsitingini.

## 9/26 26/00106 - Val av valnenvdum

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Býráðið | 26.02.2026 | 9/26 | 26/00106-1 |

| **Málslýsing:** |
|---|
| Hesi fólk eru spurd, og hava játtað av verða í valnevndunum.<br><br>**Kommunala valnevndin:**<br>Poula G. á Líðarenda, formaður<br>Eiler Hansen<br>Dagmar Jacobsen<br><br>**Valnevndin í Gøtu:**<br>Poula G. á Líðarenda, formaður<br>Poula Poulsen<br>Dagmar Jacobsen<br><br>**Valnevndin í Leirvík:**<br>Eiler Hansen, formaður<br>Signar á Reyantrøð<br>Tórhild Bjarkhamar |

| **Fíggjarligar avleiðingar:** |
|---|
| |

| **Tilmæli** |
|---|
| |

**Býráðið 26. februar 2026**
Einmælt samtykt at velja omanfyri standandi valnevndir.

## 11/26 Umsókn um grundøki og byggiloyvi - Íbúðarbygging á havnalagnum - matr. nr. 169a í Leirvík

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Byggi - og býarskipanarnevnd | 18.02.2026 | 4/26 | 26/00023-3 |
| 2 Vinnunevndin | 17.02.2026 | 1/26 | 26/00023-3 |
| 3 Býráðið | 26.02.2026 | 11/26 | 26/00023-3 |
| 4 Fíggjarnevnd | | | 26/00023-3 |

| **Málslýsing:** |
|---|
| **Upprunin til máli:**<br>Eysturkommuna hevur móttikið umsókn til íbúðarbygging á matr. nr. 169a í havnalagnum í Leirvík.<br><br>**Lýsing av málinum:**<br>Ætlanin er at byggja ein bygning við 2 hæddum, har 7 íbúðir eru á hvørjari hædd, umframt ein bygning við teimum íbúðum sum eisini eru í 2 hæddum.<br><br>**Upplýsingar frá umsitingini:**<br>Bygningurin við tveimum íbúðum er staðsettur framman fyri omankoyring til bátabrúgvarnar, og til ber ikki at byggja har, tá hetta avmarkar atkomuna til bátabrúgvarnar.<br><br>Eysturkommuna kann geva tilsøgn til økið svarandi til 1370 fermetrar, sum svarar til bygningin við 14 íbúðum.<br><br>**Skjøl:**<br>• Støðumynd – íbúðir í havnalagnum í LV<br>• VS_Umsókn um byggiloyvi á keiøkinum i Leirvík<br>• VS_2. Fílur<br>• VS_3,4 og 5 filur<br>• VS_6-7-8-9 fílur til download |

| **Fíggjarligar avleiðingar:** |
|---|
| |

| **Tilmæli** |
|---|
| Umsitingin mælir til, at geva tilsøgn til økið sum víst á kortinum í eitt ár. |

**<u>Byggi - og býarskipanarnevnd 18. februar 2026</u>**
Byggi- og býarskipanarnevndin tekur undir við tilmælinum hjá umsitingini, treyta av at byggiloyvi er endaliga avgreitt innan ásettu tíðina.

**<u>Vinnunevndin 17. februar 2026</u>**
Vinnunevndin tekur undir við tilmælinum hjá Byggi- og býarskipanarnevndini.

**Býráðið 26. februar 2026**
Málið tikið av skrá.

## Til viðgerð fyri afturlatnum hurðum:

## 10/26 Útbjóðing av Niklasmørk - matr. nr. 215a í Syðrugøtu

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Byggi - og býarskipanarnevnd | 18.02.2026 | 9/26 | 26/00079-1 |
| 2 Fíggjarnevnd | 23.02.2026 | 3/26 | 26/00079-1 |
| 3 Býráðið | 26.02.2026 | 10/26 | 26/00079-1 |

**Byggi - og býarskipanarnevnd 18. februar 2026**
Byggi- og býarskipanarnevndin tekur undir við tilmælinum hjá umsitingini.

**Fíggjarnevnd 23. februar 2026**
Fíggjarnevndin mælir til at taka undir við tilmælinum hjá byggi- og býarskipanarnevndin.

**Býráðið 26. februar 2026**
Einmælt samtykt at taka undir við tilmælinum hjá byggi- og býarskipanarnevndini og fíggjarnevndini.

fundurin lokin kl 19.00

Per Martin Gregersen

Magnus Skoralíð

Hanna Jensen

Ann Fuglø

Heri Mikálsson

Pól í Skorini

Unn Jarnskor
Ellingsgaard

Tórur Didrik Djurhuus

Uni Rasmussen